# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

B36 – EB/Streymur:

# B36 vantar tríggjar liðformenn

**Teir tríggir leikararnir, sum standa fremst í røðini, tá liðformenn í B36 skulu veljast, sita allir uttanfyri, umframt at Svenn F. Jacobsen og Tamáz Nagy ikki spæla við B36 longur**




*Í B36 tykist stóra ivamálið vera, hvør skal biðja dómarabólkinum og mótstøðumonnunum góðan dag, nú teir tríggir, sum standa fremstir í liðskipararøðini, allir vanta til dystin móti EB/Streymi*

UPPTAKT
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Karoly Potemkin varð uppsagdur í B36 herfyri. Nú hevur B36 sagt farvæl við tveir leikarar aftrat. Hesaferð er ikki talan um leikarar, ið eru tveittir úr felagnum, men har man er komin ásamt um at steðga samstarvinum.

– Nagy hevði trupulleikar í heimlandinum og kemur ikki aftur, og við Svenn komu vit fram til, at tað var best at steðga samstarvinum, upplýsir Havgrímur Johannesen, ið er ein av teimum, ið varar av Formulahópinum hjá B36.

Hann leggur beinanvegin aftrat, at B36 hevur fingið tveir nýggjar og góðar mans í staðin, og sipar til landsliðsleikaran Súna Olsen og enska áleyparan Sam Melson. B36 hevur seinastu vikurnar bíðað eftir spæliloyvinum hjá fyrrverandi Plymouth áleyparanum, og í gjár komu endaligu loyvini til árstalsfelagið. Sostatt verður hann tøkur, tá EB/Streymur vitjar sunnudagin.

Men at hann er tøkur munar helst lítið, tá nýggjur liðformaður skal veljast. Og tað skal tað, tí teir tríggir, sum standa í fremstu røð, tá liðformenn skulu veljast, sita allir uttanfyri. Klæmint Matras er leikbannaður, Herbert í Lon Jacobsen skaddur og Ingi Højsted tað sama. Tískil skal nýggjur liðformaður finnast sunnudagin.

## Sorin úti

Í EB/Streymi vanta teimum eisini tríggjar týdningarmiklar leikarar. Mikkjal Thomassen og Høgni Zachariassen eru framvegis skaddir, og nú er Sorin Anghel heldur ikki tøkur. Hann er farin til heimlandið at halda brúdleyp, og verður heldur ikki við til heimadystin móti Manchester City.

Sostatt eru tað tríggir mans, sum hava meldað Sigfríði Clementsen avboð. Hinvegin hevur Dánjal Davidsen meldað seg tøkan, eftir at hann hevur vant við aftur seinastu dagarnar.

Móti fuglfirðingum farna vikuskifti sat Marni Djurhuus leikbann av sær. Hann er tískil tøkur sunnudagin, og kemur ivaleyst beint inn í miðverjuna aftur, har Anders Post Jacobsen spældi seinast.

## Summarmeistari

EB/Streymur hevur fyrr í ár vunnið sær í so góða støðu, at teir kunnu tapa tríggjar teir seinastu dystirnar undan summarsteðginum, og framvegis vera fremst og rópa seg summarmeistarar. Hinvegin er eingin ivi um, at teir á pappírinum áttu at vunnið bæði á Víkingum og ÍF, hóast talan var um útivallardystir. Nú skal EB/Streymur royna seg á útivølli triðja dystin á rað. Dysturin er eisini seinasti dysturin, áðrenn mætu Manchester City koma á Tórsvøll. Ein sigur hevði verið hóskandi upptakt hjá sundalagsmonnum – eisini um teir ynskja at varðveita fjarstøðuna niður til hini liðini.

B36 skal eisini møta stórfelag hósdagin. Tað verður í Brøndby, og tí er oddaliðið í Formuladeildini ikki so galið at fyrireika seg við. Hinvegin eru teir yvirhálaðir av Víkingum eftir síðsta umfar, og liggja tískil á fimta plássi – 11 stig handan EB/Streym.

ÍF - KÍ

# Fuglfirðingar favorittar

**Klaksvíkingar eru hart raktir, og fuglfirðingar vanta verjuskansan, tá tey bæði liðini við 17 stigum hvør bresta saman leygardagin**

UPPTAKT
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Fuglfirðingar hava vunnið tveir dystir á rað, og hava heimavøll, tá klaksvíkingar vitja framskundaða dystin, sum verður spældur leygardagin kl. 17.00, og ikki sunnudagin sum upprunaliga ætlað. Hetta hevur við sær, at fuglfirðingar fyri einaferð skyld eru at meta sum favorittar at vinna dystin.

Annað, ið talar fyri hesum uppáhaldið er, at klaksvíkingar eru hart raktir manningarliga. Royndu menninir Jan Andreasen og Heðin á Lakjuni eru báðir leikbannaðir, og nýggi miðvallarleikarin, Emil Nolsøe Leivsson, er burturstaddur. Haraftrat rokna klaksvíkingar ikki við, at Kristian á Lakjuni og Harley Bertholdsen verða tøkir longu leygardagin. Hesir fimm eru allir mans, ið vanliga høvdu byrjað inni hjá klaksvíkingum.

## Bartal leikbannaður

Hjáheimamonnunum stendur betur til. Bartal Eliasen hevur leikbann, og tað er dyggur smeitur hjá uppflytarunum, sum hava vunnið tveir heimadystir á rað, og nú fara eftir tí triðja. Sasha hevur verið úti leingi. Hann er so smátt við at koma fyri seg, men í Fuglafirði rokna tey ikki við, at hann verður tøkur leygardagin.

Hinvegin tykist Alexandur Jovevic at vera komin fyri seg. Hann kom á vøllin móti dystarenda, tá EB/Streymur vitjaði farna vikuskiftið, og verður heilt víst við, tá klaksvíkingar vitja í morgin.

ÍF og KÍ eru ájøvn í stigum. 17 hava tey í part, og tað er júst sama stigatal, ið niðurflytararnir AB endaðu á í fjør. Liðið beint omanfyri strikuna í fjør var B71, sum hevði 32 stig. Men fyri tveimum árum síðani tryggjaði VB/Sumba sær sætið í deildini við 20 stigum. Hesum fara bæði fuglfirðingar og klaksvíkingar eftir leygardagin kl. 17.00.